# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Anton Skorastein** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju mikudagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Anton kunnu lata Leguhúsinum í Nesvík eina gávu.

**Jákup Edvard Joensen, Klaksvík**, vanliga nevndur Jage á Ternuni, andaðist á Norðoya Røktarheimi sunnudagin 17. mai, 90 ára gamal.

# Stýrimenn frá 1959 hittust aftur



Fríggjadagin 15. mai 2009 hittust nakrir av teimum, sum tóku stýrimansprógv á Føroya Sjómansskúla í mai 1959, á Hotel Føroyum til 50 ára hátíðarhald.

Stýrimenn á myndini: **Aftara rað f.v:** Eskild Hansen av Toftum (býr í Havn), Tróndur Tróndarson úr Skálavík (býr í Havn), Amaliel Knudsen úr Heiðunum (býr í Saltangará), Henrik Jacobsen av Glyvrum (býr í Vág), Jógvan Joensen av Strondum (býr har enn), Hendrik Stórá úr Skopun (býr í Havn), Ernst Jacobsen úr Kollafirði (býr í Nestun í Norra).

**Fremra rað f.v.:** Jógvan Joensen av Hvítanesi (býr í Havn), Sámal Jacobsen úr Skálavík (býr í Havn), Elsbert Jacobsen úr Kolbanargjógv (býr har enn), Eilert Mikkelsen úr Havn, býr har enn, og Olaf Olsen úr Søldarfirði, býr á Glyvrum.

Fýra kundu ikki vera við: Thorkil Mortensen av Tvøroyri, nú í Glostrup, Ragnar Tróndheim úr Leirvík, nú í Runavík, Sune Jacobsen av Strondum, býr har enn, og Harry Magnussen av Glyvrum, býr nú í Frederiksværk

Fýra eru deyðir: Kjartan Justinussen úr Havn, Jens Vestergaard av Økrum, Regin Hansen úr Leynum, og Hans Rasmussen úr Søldarfirði.

*mg*

**Dagurin**
**19. mai. Potentiana.** Rómversk genta, sum 16 ára gomul varð tikin av døgum í Róm. Robert Joensen doyði hendan dagin í 1997.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



*Curt & Roland í 1979*

# Curt Petersén deyður

Leygardagin 16. mai andaðist svenski gospelsangarin Curt Petersén í heimi sínum í Falköping, 62 ára gamal.

Curt var kendur frá duettini Curt & Roland, sum fleiri ferðir hevur vitjað í Føroyum. Teir vitjaðu her fyrstu ferð í 1978, síðan fleiri ferðir fram til 1989.

Curt byrjaði longu at syngja sum 15 ára gamal, og í 1963/64 hitti hann Roland Lundgren, og teir báðir gjørdust kendir gospelsangarar bæði heima í Svøríki og kring um í Evropa og USA.

Miðskeiðis í 90-unum fekk Curt staðfest krabbamein, men hann var tó førur fyri at syngja í nøkur ár eftir tað. Seinasta plátan hjá Curt & Roland, Solregn, kom út í 2000.

Meira fæst at vita um Curt & Roland á heimasíðuni: www.curolmusic.se

*mg*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jákup Edvard Joensen**
Klaksvík
vanliga nevndur Jagi á Ternuni,

andaðist á Norðoya Røtarheimi sunnudagin 17. mai 2009, 90 ára gamal.
Farið verður úr kapellinum heim í Betesda mikukvøldið klokkan 18.00.
Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.00

*Familjunnar vegna*
**Steinvør, Leivur, Ingun og Anna Maria**

Tey, ið ynskja at minnast Jákup, kunnu lata eina peningagávu til Akurin, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Heiðvík Midjord**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.
Takk til Símun Jacobsen, prest, fyri troystarrík orð.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, og takk til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Heri, Johanna Maria og Marjun**

## Tøkk

Vit vilja takka øllum sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá góði pápi, bróður, abbi og pápabeiggi okkara

**Hendrik Petersen**
Funningur

andaðist og var borin til jarðar.
Vit takka Emil Olsen, presti, fyri góð orð. Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, sangarum , gravarum og øllum teimum ið hjálptu við ervinum í skúlanum.
Tøkk til tykkum øll, sum komu í kapellið og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Johannes Pauli, Petur Eivind og Martin við fam.**